MARKAMÓTSNEVNDIN

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting 15. august 2025

Avgerð um hvør skal veita tænastu til borgara við demensi – umlætting og búpláss

Málslýsing
Almannaverkið heitti við skrivi, dagfest 4. apríl 2025 á Markamótsnevndina, um at taka støðu til, um tað er Almannaverkið, sum skal veita umlætting eftir almannalógini ella eldraøkið, sum skal veita búpláss eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Ítøkiliga málið er um ein borgara undir fólkapensjónsaldur, sum hevur fingið staðfest diagnosuna Lewy Body demens, ið er sjúka við fluktuerandi kognitivari svíkjan, sjónshallucinatiónum og parkinsonismu. Umframt at sjúkan viðførir atferðarligar avbjóðingar, hevur borgarin umfatandi tørv á røkt. Almannaverkið og eldraøkið eru ósamd um, hvat tað er fyri tænastu borgarin hevur tørv á og hvør skal veita hvørja tænastu.

Almannaverkið hevur veitt dagtilboð til borgaran síðani desember 2023. Í byrjanini av 2025 vísa tey avvarðandi á, at heilsustøðan alsamt versnar og at borgarin hevur størri tørv á hjálp. Tey verða tá vegleidd um at søkja um umlætting og búpláss.

Kommunala samstarvið vísir á, at tað hevur bjóðað heimahjálp og hetta hevur familjan í fyrstu atløgu takka nei til tí hetta var ikki hóskandi hjálp.

Síðani í 2025 hevur borgarin fingið bjóðað víðkað dagtilboð frá Almannaverkinum soleiðis at hetta eisini fevnir um leygardag og harumframt er avtala gjørd við kommunala samstarvið um, at samstarvið veitir borgaranum stuðulstænastu í framhaldi av dagtilboðnum í somu hølum tvey kvøld um vikuna.

Almannaverkið hevur upplýst fyri Markamótsnevndini, at tey hava skipað seg soleiðis, at tey veita umlætting til borgarar, undir fólkapensjónsaldur, við demens við at keypa tænastuna frá eldrasamstørvunum. Almannaverkið vísir á, at tey hava vent sær til kommunala samstarvið og fleiri onnur kommunal samstørv um keyp av umlættingarplássi, men at tað ikki hevur eydnast at fáa nakra avtalu í lag, tí pláss eru ikki tøk. Kommunala samstarvið vísir í sínum viðmerkingum á, at tey ikki hava nakað tøkt búpláss í løtuni og at tað altíð er borgarin við størsta tørvi, sum verður visiteraður inn fyrst.

Tað sæst í læknaváttanum frá mars og juli 2025, at borgarin hevur stóran og vaksandi tørv á røkt og hjálp til alt í gerandisdegnum og at læknin metir, at borgarin tørvar eitt búpláss, tí tað ikki eru útlit fyri at borgarin verður betur fyri, men at tað hinvegin er greitt at heilsustøðan og harvið røktartørvurin bert fer at økjast.

Niðurstøða
Markamótsnevndin hevur í avgerðum nr. 1 og 2 mett um markamótið millum, nær Almannaverkið skal veita dagtilboð og umlætting eftir almannalógini og, nær ábyrgdin er kommunal eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Markamótsnevndin hevur áður staðfest at dagtilboð og umlætting til fólk undir fólkapensjónsaldur við demens hoyrir til ábyrgdarøkið hjá landinum og at kommunurnar harafturímóti í ávísum førum hava ábyrgd av at veita búpláss til henda málbólk tá tørvur gerst á slíkum.

§ 14. *Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.*
Stk. 2. Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti.

Viðmerkingarnar til omanfyri nevndu áseting í § 14 stk. 2. í Løgtingslóg um um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 siga millum annað:

"Ásetingin inniber, at røktarheim og eldrasambýli í serligum føri kunnu hýsa yngri borgarum, sum eru røktarkrevjandi og sum tørva røkt alt samdøgrið. Tað kann td. vera borgari sum fær demenssjúku áðrenn pensjónsaldur. Í slíkum førum er týdningarmikið at taka atlit til hvørji tilboð annars eru tøk í økinum bæði undir kommunalum og undir landsins myndugleika."

Markamótsnevndin hevur áður úttalað, at § 14, stk. 2, má tulkast í ljósinum av yvirskipaðu ætlanini aftanfyri lógina, nevniliga at sleppa av við ógreiðu markamótini millum land og kommunur. Álitið frá Trivnaðarnevnd Løgtingsins í løgtingsmáli nr. 64/2013 frá 18. mars 2014 og broytingaruppskotið millum 1. og 2. viðgerð, ið m.a. innihelt uppskotið til verandi § 5, stk. 5, sigur frá hesum.
Eisini kann vera víst á, at eitt berandi atlit í sambandi við útleggingina var, at borgarans tørvur, heldur enn spurningurin um 67 ára markið, skuldi vera avgerandi.

Út frá upplýsingunum, sum Markamótsnevndin hevur fingið um tørvin hjá borgaranum, er tað nógv, sum talar fyri at heilsustøðan hjá borgaranum nú er soleiðis, at borgarin hevur tørv á røkt alt samdøgrið og tí eigur at fáa eitt búpláss á eldraøkinum. Tó metir Markamótsnevndin, at Almannaverkið framhaldandi eigur at veita tænastu til borgaran, til búpláss er tøkt.

Eftir verandi lóggávu hava borgarar ikki rættarkrav uppá búpláss til ávísa tíð. Og tá ið Markamótsnevndin kemur við einari avgerð, er tað ein spurningur um, hvør eigur ábyrgdina av at veita eitt tilboð, ikki um ein borgari fær eitt tilboð.

Anna Dam, forkvinna

Jan Sjóstein

Katrin Danielsen